# Føroyska oljuvinnan er ein óviss satsning


Faroe Connector, flaggskipið hjá Esvagt Thor, skiftir manning í Havn

Mynd: Jan Müller

**P/F Thor í Hósvík ansar væl eftir ikki at flóta út í oljuvinnuna á uppskrúvaðum vónum. Heldur enn at byggja sína offshore-satsing á føroyska oljuvinnu burturav er fyritøkan nógv úti um seg uttan fyri landoddarnar, samstundis sum roynt verður at fáa fótafesti í heimligu oljuvinnuni**

*Rúnar Reistrup*

Tað verður ikki nøkur vanlukka fyri P/F Thor, um føroyska oljuvinnan ikki fer at liva upp til tær risavónir, sum hesi seinastu árini hava trífaldað húsaprísir og sett búskapin upp á kók. Reiðaríðið hevur bygt sínar íløgur í føroysku offshore-vinnuna á verandi umstøður heldur enn á framtíðardreymar, og hevur soleiðis roynt at satsa so lítið sum gjørligt í royndunum at gerast ein týandi partur í føroysku oljuvinnuni.

— Føroysku vónirnar til oljuvinnuna eru alt ov høgar. Tað gongur væl búskaparliga í løtuni, men vit mugu minnast til at tað skal lítið til áðrenn tað byrjar at ganga hinvegin. Beint nú er føroyska samfelagið mitt í einari ekspansiónsfasu hvat oljuvinnuni viðvíkur, samstundis sum fiskivinnan klárar seg sera væl. Men um nú annaðhvørt fiskiskapurin ella leitingaraktiviteturin komandi árini minkar, so gongur tað knappliga ikki so væl longur, og hesum taka vit hædd fyri sigur Gunnbjørn Joensen, sum saman við beiggjanum Hans Andreas eigur og rekur P/F Thor.

## Hyggja úteftir

Tískil ger reiðaríðið nógv við at føla seg fram uttan fyri landoddarnar, soleiðis at øll offshore satsingin ikki stendur og fellur við føroysku oljuvinnuni. Einasta satsingin hjá P/F Thor, sum beinleiðis er vend ímóti føroysku oljuvinnuni, er samstarvið við donsku fyritøkuna ESVAGT um standby-skipið Faroe Connector, sum kom undir føroyskt flagg 2. juli í ár. Men møguleikarnir at fara út um landoddarnar við hesum skipinum verða eisini dúgliga kannaðir.

Sum er hevur Faroe Connector tó úr at gera við at fylgja boriskipinum West Navion, sum nú borar í enskum sjógvi. Fyritøkan ESVAGT-Thor, ið Thor og ESVAGT eiga í felag, hevur ein eitt ára sáttmála við BP um leigu av Faroe-Connector. Tá hetta leiguskeiðið er liðugt vónar Thor at tað fer at bera til at leingja sáttmálan við BP, men um hetta ikki ber til, kann skipið fara hvagar tað skal vera, sigur Gunnbjørn Joensen, sum millum annað hevur sent síni smærru standby-skip á uppgávur so langt burturi sum í Persisku Víkini og Vesturafrika.

## Skulu ongan kodda hava

Hóast Thor hevur verið í offshore vinnuni síðan 1998, tá fyritøkan fekk fyrsta standby-skipið til landið, so var tað ein nøggj tíð sum byrjaði í summar, tá oljuleitingin á føroyskum sjóøki fór í gongd. Andin í føroysku oljulóggávuni leggur upp til at útlendsku oljufeløgini í størst møguligan mun skulu samstarva við føroyskar fyritøkur, treytað av at hesar eru kappingarførar, og hetta hjálpti uttan iva Thor til at fáa sáttmálan við BP.

— Tað at vit eru ein føroysk fyritøka gav okkum sjálvsagt ein fyrimun í mun til útlendsku fyritøkurnar, men vóru vit ikki kappingarførir, so høvdu vit neyvan fingið sáttmálan við BP, og eru vit ikki kappingarførir tá sáttmálin gongur út, so fáa vit ikki longt hann og tí setur tað stór krøv til fyritøkuna um vit skulu fáa nakað burturúr hesum, sigur Gunnbjørn Joensen, sum sjálvur er fegin um hørðu kappingina.

— Tað ringasta sum kann henda er at føroysku fyritøkurnar fáa so stóran kappingarfyrimun ígjøgnum treytir og reglur at tær fáa ein kodda at sovna á, tí so fara tær ongantíð at klára seg í beinhørðu kappingini í oljuvinnuna, heldur Gunnbjørn Joensen.

Undir sjálvari boringini hjá West Navion á føroyskum øki fekk Thor einki at vita um hvussu leitingin gekst, og tí mertiskt tað ikki á arbeiðinum, at einki varð funnið. Men tað hevði verið ein stórur fyrimunur fyri offshore-satsingina hjá reiðaríðnum, um olja varð funnin í boringini hjá BP, og tí var úrslitið eitt lítið vónbrot fyri eigararnar.

Tað fær tó ikki fyritøkuna at ivast í at halda fram í offshore-vinnuni, serliga tá tað nú hevur víst seg, at olja er at finna í føroysku undirgrundini, men verður uppfatað sum enn ein ábending um, at tað er umráðandi eisini at vera úti um seg í útlendsku oljuvinnuni.

Δ

# Tað var rætt at fara við

**Nú tyrlurnar, sum síðan juli mánað hava flogið útgerð og fólk millum Føroyar og leitiøkini, um stutta tíð hava flogið síðsta túrin í hesum leitingarskeiðnum, er Altantic Airways stjórin, Magni Arge, sannførdur um at tað var rætt at fara inn í oljuvinnuna longu í leitingarfasuni**

OLJA
*Rúnar Reistrup*

— Vit hava fingið virðismiklar royndir og hava avmystifiserað oljuvinnuna, samstundis sum tað hevur givið okkum eitt lítið avkast, og so kann man ikki vera annað enn nøgdur, sigur Magni Arge, stjóri fyri einasta føroyska flogfelagnum, sum í skjótt eitt hálvt ár hevur staðið fyri allari flogferðslu í sambandi við oljuleitingina á føroyskum øki.

Við tveimum tyrlum hjá bretsku fyritøkuni Bristow hevur Atlantic Airways rikið alla tyrluflúgving millum Føroyar og leitipallarnar á oljuleitingarøkjunum. Harafturat hevur flogfelagið flogið millum 3 og 4 ferðir um vikuna á rutuni Aberdeen-Vágar við fyrst og fremst oljufólki.

## Kunnu saktans klára tað

Niðurstøðan eftir at hava verið hjáveitari hjá øllum teimum trimum oljufeløgunum, ið hava leitað á føroyskum øki hetta fyrsta leitingarskeiðið, er greið.

— Vit kunnu saktans standa fyri allari flúgving í sambandi við føroysku oljuvinnuna, eisini um hendan tekur dik á seg og farið verður undir at útvinna olju úr føroysku undirgrundini, sigur Atlantic Airways stjórin, sum ikki dylir fyri at uppgávan tyktist nokkso møtumikil áðrenn farið varð undir hana.

— Vit vistu ikki hvussu tað fór at vera at arbeiða saman við slíkum risafyritøkum, sum hesi oljufeløgini jú eru, og vit vóru ikki heilt greið yvir júst hvat tað innibar. Vit vita nú heilt greitt hvat tað vil siga at vera hjáveitari hjá oljufeløgunum, og at fyritøkan er før fyri at átaka sær tað. Tí eru vit heldur ikki longur í iva um at tað var púra rætt av okkum at fara inn í oljuvinnuna heilt frá fyrstu royndarboring.

## Keypa onga tyrlu enn

Hóast olja nú er funnin í føroysku undirgrundini, so er enn ikki víst at gongd nakrantíð kemur á oljuframleiðslu á føroyskum øki, og meðan hetta er støðan, traðkar Atlantic Airways varliga fram. Tyrlukeyp verður ikki so mikið sum umhugsað fyrr enn oljuframleiðsla stendur fyri framman, og enn er flogfelagið ikki farið undir at útbúgva tyrluskiparar til stóru tyrlurnar hjá Bristow.

— Tað var allatíðina ætlanin, at okkara tyrluskiparar so líðandi skuldu manna tyrlurnar, og at okkara teknikkarar skuldu

Framhald á næstu síðu



*Framhald av s. 10*

vera førir fyri at røkja tær. Men higartil hava vit ikki havt arbeiðsorku til at fara undir at útbúgva fólk til hetta, tí vit hava havt aðrar krevjandi uppgávur í summar, sigur Magni Arge.

Sum tað sær út í løtuni verður bara ein royndarboring á føroyskum øki komandi ár, og Atlantic Airways stjórin ivast í, um tað kann loysa seg at fara undir at útbúgva fólk, meðan virksemið á leitingarøkinum er so lítið.


Bristow-tyrla í arbeiði. Vitjandi á boripalli koma aftur til lands

Mynd: Jan Müller

## Nýggj flogruta

Meðan tyrluflúgvingin í sambandi við oljuleitingina soleiðis hevur latið upp fyri einari nøggjari vinnugrein, hevur flutningurin av oljufólki til Føroya latið upp fyri einari nýggjari flogrutu í ferðaætlanini hjá Atlantic Airways. Flestu oljufólkini, ið hava starvast á leitipallunum í føroyskum øki, eru komin til Føroya úr Aberdeen. Hetta hevur skapt grundarlag fyri regluligum flogferðum millum Aberdeen og Føroyar, sum eisini hevur verið nógv brúkt av ferðafólki.

## Ongan kappinginarneyta

Tá oljufeløgini fyrr í ár skuldu velja sær hjáveitarar var Atlantic Airways í teirri serstøðu, at fyritøkan í veruleikanum ongan kappingarneyta hevði. Við at vera einasta føroyska flogfelagið var Atlantic Airways eisini einasti valmøguleiki, um oljufeløgini vildu brúka føroyskan hjáveitara. Hetta valdu øll tey trð leitandi oljufeløgini at gera.

Men við endurskapta bjartskygninum, sum hevur staðist av fundinum hjá Amerada Hess, er eisini hugsandi at onnur flogfeløg fara at fáa áhuga fyri tí nøggja marknaði, sum føroyaøkið møguliga fer at menna seg til.

— Tað mugu vit hava í huganum og royna at fyrireika okkum sum best uppá, at vit kunnu fara at møta kapping í framtíðini, sigur Magni Arge, sjtóri í Atlantic Airways.

Δ

# Førleikamenning og føroysk luttøka

FØRLEIKAMENNING
*Ólavur Gregersen*


*Um føroyskar fyritøkur vilja fáa lut í førleikamenningini, sum teimum stendur í boði frá oljufeløgunum sambært leitiloyvunum, so mugu fyritøkurnar í fyrsta lagi staðfesta, hvar og hvussu teimum tørva førleikamenning, og síðan liggja framvið fyri at fáa part av teimum midlum, sum eru sett av til hetta økið, sigur Ólavur Gregersen*

Oljufeløgini, sum leita eftir olju í Føroyum, hava bundið seg til at virka fyri føroyskari luttøku í oljuvinnuni, m.a. við førleikamenning á føroyskum fyritøkum og við at knýta sambond við útlendskar samstarvsfelagaðar.

Við hesum hava føroyskar fyritøkur fingið høvi at menna førleika og kappingarføri sítt. Hetta er ein ágóði, sum føroyska samfelagið og vinnan longu hava fingið í sín part, óansæð um kolvetni verða funnin ella ikki.

Agip hevur tikið kravið um førleikamenning í álvara, og í hesi grein verður greitt frá, hvussu Agip ætlar at lúka kravið um førleikamenning.

## Stutt um AGIP

Agip er partur av italska orkufelagnum ENI, ið er virkið innan oljuvinnu, jarðgass- og petrokemivinnu, tænastur til oljuøki og verkfrøði. Kappingarførið hjá felagnum er sera gott, og tað hevur eina leiðandi marknaðarstøðu innan hesar vinnur.

ENI er virkið í meira enn 70 londum, og hevur meira enn 72.000 fólk í starvi. ENI framleiðir meira enn eina millión tunnur av olju um dagin, og verður roknað sum sætta størsta oljufelag í heiminum.

## Endamál við BDAS

Vinnuráðgevingin hjá Agip Faroe Branch ber enska heitið Business Development Advisory Service, stytt BDAS, og er stovnað við hesum endamálum:

- at lúka krøvini í leitiloyvunum um føroyska luttøku
- at vera við til at gera føroyska búskapin meira fjøltáttaðan
- at menna nýggjar útflutningsmøguleikar innan føroyska vinnulívið
- byggja upp kappingarføri og tøkniliga vitan hjá føroyskum fyritøkum. Hetta kann eisini verða gjørt í samstarvi við útlendskar fyritøkur.

Samanumtikið er endamálið við BDAS at menna førleikan hjá føroyskum fyritøkum, so tær verða førar fyri at kappast á jøvnum føti á altjóða oljuvinnumarknaðinum. Ráðgevingin er tó ikki bert avmarkað til fyritøkur innan oljuvinnuna, men er eisini ætlað virkjum og verkætlanum, sum eru nýskapandi og hava møguleikar á útflutningsmarknaðinum.

## Lýsing av ráðgevingini

BDAS fer at veita trý ymisk sløg av ráðgeving, sum verður ólík í innihaldi og høvuðsdenti.

Tann mest umfatandi ráðgevingin verður rópt »Víðfevnd vinnuráðgeving«, sum verður veitt ávísum fyritøkum, sum Agip hevur valt út hetta seinasta hálva árið.

Endamálið við hesari ráðgevingini er at stimbra fyritøkuni í at gerast ein betri í heimsflokki. Marknaðurin hjá veitaranum kann verða tann føroyski/altjóða oljuvinnumarknaðurin ella aðrir útflutningsmarknaðir, treytað av at teir eru við til at gera tann føroyska búskapin meira fjøltáttaðan.

BDAS fer at ráðgeva í sambandi við virkismenning og marknaðarmenning hjá fyritøkuni — til dømis innan strategiska ráðlegging; heildargreining og seta málsetningar, marknaðargreining, førleikagreining o.s.fr. Harumframt fer BDAS at lætta um hjá fyritøkuni, tá talan er um at nema sær útbúgving, tøkniliga førleikamenning, góðsku- og HSE skipanir og at fáa í lag handilssambond.

Umframt »Víðfenda vinnuráðgeving« fer Agip eisini at veita sokallaða »Ad hoc vinnuráðgeving«, sum stendur øllum føroyskum fyritøkum við áhuga fyri oljuvinnu í boði. Fyritøkur kunna seta seg í samband við Agip til tess at fáa ávísar upplýsingar ella serkøna meting, t.d. tá talan er um marknaðarupplýsingar, spurningar viðvíkjandi góðsku og HSE skipanum, upplýsingar og fyrispurningar um møguligar samstarvsfelagar, seljarar og veitarar, o.s.fr.

## Skipa fyri útbúgvingartiltøkum

BDAS fer umframt beinleiðis ráðgeving at skipa fyri seminarum og útbúgvingarskeiðum. Hetta virksemið verður í samstarvi við føroyskar stovnar og fyritøkur, sum eru virkin á hesum øki - m.a. er ætlanin at skipa fyri einum seminari fyrst í komandi ári um gagnnýtslu av góðskustýring í dagliga rakstrinum.

Agip fer eisini at menna eitt sonevnt »Petroleum Exploration Business Game« í samstarvi við føroyska KT fyritøku, og væntandi verður sáttmáli undirskrivaður seinast í november mánaði. Spælið er ætlað næmingum í miðnámsútbúgvingum, og endamálið er at økja kunnleikan um leitingarvirksemið, sum fer fram við Føroyar.

## Mugu liggja framvið

Omanfyri er nomið við nakað av tí, sum Agip ætlar at gera innan førleikamenning í føroysku vinnuni. Um føroyskar fyritøkur vilja fáa lut í førleikamenningini, sum teimum stendur í boði frá oljufeløgunum sambært leitiloyvunum, so mugu fyritøkurnar í fyrsta lagi staðfesta, hvar og hvussu teimum tørva førleikamenning, og síðan liggja framvið fyri at fáa part av teimum midlum, sum eru sett av til hetta økið. Tær fyritøkur, sum leggja seg eftir hesum leisti, fara ivaleyst at sanna, at førleikamenning kann gerast ein dyggur stuðul í royndunum at taka lut í oljuvirkseminum í Føroyum.

Δ